GJALDSTOVAN

## Teldutilboð til KT Landsins

KT Landsins hevur fingið áheitanir frá Fíggjarmálaráðnum og stovnum í Landsnet, um at skipa fyri felags innkeypi av telduútbúnaði fyri at tryggja stovnunum besta møguliga prís. Sum eina roynd at røkka hesum máli ynskir KT Landsins at biðja um tilboð uppá eina størri mongd av farteldum. Teldurnar skulu fyri tað mesta brúkast til vanligt kontór brúk t.e. tekstviðgerð, rokniark, framløgur, journal, internet o.s.fr. Dentur skal leggjast á at teldurnar skulu vera telduрøðir, sum eru ætlaðar til Business/Professional brúk.

Hervið verður biðið um tilboð uppá:

50 stk. farteldur við tilhoyrandi dokking støð.

<u>Minstu</u> krøv til telduútbúnaðin pr. 02. septembur 2016 eru hesi:

- 14” skerm
- Metall ella kolfibur kabinet
  (palmrest, lok og botnur - minst 2 av 3 skulu vera úr metall/kolfibur)
- Intel i5 processor - 6rd generation
- 256GB SSD Harddisk
- 8GB RAM
- TPM (Trusted Platform Module )
- Gigabit netkort v/ innbygdum RJ45 stikki
- 802.11 /g/n/ac tráðleyst netkort
- Bluetooth
- USB 3.0
- Innbygd webcam, hátalarar og mikrofon
- Stuðla dokkingstøð (ikki USB el. Bluetooth samband)
- Stuðla 2 eksternum skermum tá teldan er dokkað
- Streymveiting til teldu og dokkingstøð = 2 stk.
- Windows 10 Pro OEM stýriskipan
- 3 ára garanti
- Skal vera Energy Star 5.0 góðkend
- Skal lúka umhvørvisgóðkenningar so sum Svanamerki ella EPEAT Gold

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

- Veitarin skal vera góðkendur av framleiðaranum, antin sjálvur ella ígjøgnum triðjapart, til at gera umvælingar av telduútbúnaðinum í Føroyum.

Onnur viðurskifti, sum verða tikin við í vektingini:

- Vekt og stødd á teldu
- Leveringstíð til teldurnar eru hjá keypara
- Eyka kostnaður fyri DVD-R drev, um tað ikki er standard
- Fullfíggjaðir drivara pakkar til System Center Configuration Manager tøkir
- Um garanti ikki er eins fyri allar lutirnar ynskist hetta útgreinað
- Hvat er vanlig umvælingar tíð fyri garanti umvælingar

Tey, sum lata tilboð inn skulu útfylla og lata inn hjálagda svar skjalið :

” **Tilboð - Lagurteldur Septembur 2016 - Telduinfo - VEITARI.xlsx**”.

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum – um nakað – tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.

Soleiðis vera tilboðini vektað:

| **Vekting:** | **%** |
|---|---|
| Prísur | 66 |
| Eyka funktiónir[**1**] | 7 |
| Vekt | 9 |
| Støddar mát | 7 |
| Leveringstíð | 2 |
| Drivara pakkar til SCCM | 5 |
| Tænastustig á garanti umvælingum | 4 |
| Samlað | 100 |

[**1**] Eyka funktiónir er tað, sum teldan hevur útyvir minstu krøvini. Tað kann verða fult Metall/kolfibur kabinet, meira RAM, CPU, DVD-drev, kort lesari, USB3.1c o.s.fr. Tað vil vera ein meting í hvussu nógv hvør eyka funktión telur.

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

GJALDSTOVAN

Um vøran verður latin seinni enn til avtalaðu tíð, tilskilar KT Landsins sær rættin til at taka hettar við í viðgerðina tá næsta útboð er til viðgerðar.

Tilboðið skal stílast til:

KT Landsins T-postur: ktskivan@gjaldstovan.fo

Øll, sum hava latið tilboð inn, fáa svar um niðurstøðuna. Keypari metir seg kunna geva svar, um tikið verður av tilboðnum ella ikki, umleið 1 viku, eftir at tilboðsfreistin er farin.

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri.

Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og annars viðgjørdir skrivliga við tí fyri eyga lættari at kunna skjalprógva samskiftið.

Spurningar av slíkum slag skulu stílast til:

Birgir av Steinum
birgir.av.steinum@gjaldstovan.fo

Tlf: 352490
Fartlf.: 792499

Við hesum verður takkað fyri áhugan og verður sæð fram til at hoyra aftur frá tykkum.

Vinaliga heilsan

Gjaldstovan
KT Landsins